# Tjaldrið segði takk fyri seinast



Dreingjamanningin á Sílinum vann á ólavsøku, og harvið eisini FM fyri 5-mannaførð

Mynd: Álvur Haraldsen

**Sílið var best í kappingini millum teir tríggjar FM kandidatarnar, men Tjaldurs dreingirnir, sum í heimasjógvi vóru so sera vónbrotnir, vunnu ólavsøkuróðurin og harvið ognarsteypið fyri triðjua ferð á rað**

5–MANNAFØR DREINGIR

*Jóannes Hansen*

Sílið er FM vinnari í kappingini millum dreingjabátar. Undan ólavsøkuni var greitt, at sera tætta kappingin stóð millum Fípuna Føgru, Sílið og Blik. Fípan Fagra leyp avstað í startinum, og eftir ein veldugan spurt vóru klaksvíksdreingir eina hálva bátslongd frammanfyri hinar bátarnar.

Men Fípan Fagra vísti seg at vera hara, sum teir plaga at kalla tað í rennikappingum, tá ein leggur ógvusliga fyri, men ikki megnar at halda tørn um oddasessin. Fípan Fagra steðgaði fullkomuliga upp, tá teinurin var hálvrógvin, og dreingirnir úr Klaksvík endaðu á fimta plássi tvær bátslongdir frá oddasessinum, sum teir eina góða løtu lógu til at vinna. Í samlaðu FM kappingini fekk Fípan Fagra bronsu.

Sílið og Blikur kappaðust um FM heitið. Teir kappaðust eisini um næstfremsta plássið í ólavsøkuróðrinum. Kappingin var tøtt, og Sílið var fyrri um málið. Munurin var ein hálv bátslongd. Harvið megnaði nýggja Sílið, hóast teir vórðu kolldømdir á Skálafjørðinum, at vinna FM heitið, og tað ynskja vit teimum hjartaliga tillukku við. Tað er ikki á hvørjum ári, at Sílið við dreingjamanning vinnur FM. Síðsti meistaraskapurin hjá Sílinum varð vunnin í 1992. Men so eigur at verða lagt afturat, at hin dreingjabáturin hjá Havnar Róðrarfelag, Drekin, vann FM í 1993, 1996 og í 1997.

Í Havnar Róðrarfelag ganga teir høgt uppí, at árið í ár er tað fyrsta síðani 1974, at Sílið hevur vunnið FM bæði við gentumanning og dreingjamanning.

## Endaðu omaná

Tjaldrið hevði neyvan nakar roknað við skuldi gera seg galdandi í ólavsøkukappingini. Men guli báturin var tann, sum heilt skjótt legði eftir Fípuni Føgru, og tá málið var hálvrógvið, var tað Tjaldrið, sum var á odda. Molin er 400 metrar langur, og allan teinin framvið áskoðaraplássunum var Tjaldrið á odda. Á málinum var fjarstøðan aftur til FM vinnararnar á Sílinum ein stórur skutur ella ein lítil hálv bátslongd.

Sigurin hjá Tjaldrinum var serliga søtur. Eitt var, at hetta var triðja ferðin upp í slag, at FM vinnararnir tvey tey seinastu árini vunnu á ólavsøku. Harvið vunnu teir ferðasteypið til ognar.

Hin síðan av søkini var, at teir umborð á Tjaldrinum vóru sera vónbrotnir, tá teir kappaðust á Skálafjørðinum. Ta ferðina komu teir í kjalarvørrin á Sílinum, sum varð kolldømt, og tí fingu teir ikki endaspurtin, sum hann skuldi vera. Tá vildu teir á Tjaldrinum hava umróður, men tað ynskið varð ikki játtað.

Eftir róðurin á Skálafjørðinum var lagið einki serligt umborð á Tjaldrinum. Fleiri umhugsaðu at fara av, men teir luttóku kortini í kappingunum, hóast tað ikki gekk nakað serligt. Undan ólavsøkuni gjørdu teir nógv við tað – eitt nú vóru teir fleiri kvøld á Havnarvág og vandu – og nú eydnaðist rættuliga væl hjá teimum.

Men eingin megnaði at gera nakað við FM heitið hjá Sílinum. Teir fingu fleiri stig enn allir hinir fingu. Tað var eitt gott avrik, tá havt verður í huga, at teir einki fingu burturúr róðrinum á Skálafjørðinum. Argjadreingir vunnu ikki á ólavsøku. Tískil vunnu teir ongan róður í ár, men avrikini vóru so mikið støðug, at teir ognaðu sær næstfremsta plássið í FM kappingini.

# Smyril argaði vágbingar eina løtu

**Men tá bátarnir komu ímóti málinum, var talan um uppvísningsróður hjá FM vinnarunum úr Vági**

6–MANNAFØR MENN

*Jóannes Hansen*

Mundi suvereni oddafiskurin síðani kappróðurin á Skálafjørðinum fara at kiksa hesa ferð. Tað var spurningurin, sum hekk í luftini, tá 6–mannaførini við monnum høvdu róð hálvan teinin. Og tað var ikki at undrast á, at tað kendist sum um, at tað var eitt sindur av fjáltri á nógvu vágbingunum, sum hoyrdust so sera væl á Molanum.

Orsøkin var tann, at Páll Fangi og Gongurólvur fingu besta startin. Páll Fangi hevði hug at halda tørn um oddasessin, og tá Smyril av álvara legði seg út í kappingina og bjóðaði Gongurólvi av, hevði Páll Fangi hug at renna undan.

Tá teinurin var hálvrógvin lógu Páll Fangi og Smyril stavn um stavn, so glapp hjá Smyrli, og ungu menninir umborð á Gongurólvi vóru pretnari, enn teir hava verið í nøkrum av hinum kappingunum. Teir tóku Páll Fanga, og teir høvdu eina lítla løtu kanska hug at bjóða Smyrli av.

Men tað var ikki hugsningur um. Smyril hevði nógv tað mestu orkuna, og á síðstu eitt hundrað metrunum fór hann í hvørjum taki frá kappingarneytunum. Páll Fangi datt púra burtur ímillum. Bæði Sølmundur og Hvessingur tóku hann, og harvið fingu teir báðir bestu úrslitini í øllum róðrarárinum.

Smyrli verður ynskt hjartaliga tillukku við fyrsta FM heitinum, síðani tað í 1975 varð farið undir FM kapping fyri 6–mannafør við monnum.

Talan er bert um triðja FM heitið á mannfólkasíðuni til Vágs Kappróðrarfelag, síðani 1973. Vágbingur vann í 1980, og Royndin Fríða vann í 1994.

Smyril við kvinnum vann FM í 1983, sum var fyrsta árið, at kvinnurnar í 6–mannaførum kappaðust um meistaraskapin. Royndin Fríða við gentumanning hevur ongantíð verið meistari. Tí er einki at undrast á, at fløggini verða vundin á stong, og vágbingar skipa fyri móttøku, tá smiðjulærlingarnir umborð á Smyrli vinna.



# Bygdamenninir settu Havnarbátin upp á pláss



Størsti taparin á ólavsøkuróðrinum í ár, varð Havnarbáturin, ið hvørki vann FM ella á ólavsøkuróðurin í ár. Her spenna allir í, tá startskotið hevur ljóðað

Mynd: Álvur Haraldsen

**Vestmenningar vunnu ólavsøkuróðurin, og Runavík fór avstað við meistaraskapinum. Harvið gjørdist Havnarbáturin stóri taparin í framúr spennandi ólavsøkuróðrinum**

10–MANNAFØR

*Jóannes Hansen*

Dramatikkurin og spenningurin vóru so stórir í finaluróðrinum í væl eydnaða kappingarárinum, sum tað ber til at ímynda sær. Undir upphitingini brotnaði ein ár umborð á Havnarbátinum. Tí var neyðugt at fáa eina nýggja ár til vega, og tað vóru sjálvandi eingir trupulleikar við tí.

Tá startskotið ljóðaði, og uppspentu vøddarnir sendu stóru og smidligu 10–mannaførini frá Argjahøvdu, hekk guli Eysturoyingurin eftir. Teir høvdu trupulleikar við at sleppa leysir av startinum, og høvuðsdómarin gjørdi av, at bátarnir skuldu starta umaftur.

Í nýggja startinum gekk alt, sum tað skuldi, og tað var heilt skjótt, at vestmenningar løgdu seg á odda og harvið boðaðu frá, at teir ætlaðu sær at vinna ólavsøkuróðurin.

Munurin var ongantíð nakar serligur. Tí vóru teir knøppu fýra minuttirnir av málinum og framvið Molanum, har áskoðararnir vóru so nógvir, sum teir sjáldan hava verið áður, fyltir við spenningi.

Vestmenningurin var leingi ein hálvan skut frammanfyri Eysturoyingin, sum aftur var ein hálvan skut frammanfyri Havnarbátin. Tað var ikki leyst frá tí fremsta og aftur til Klaksvíkingin og Nólsoyingin, sum aftur hesa ferð støðugt kappaðust um at sleppa undan aftasta plássinum. Tí kappingini kom Klaksvíkingur aftur hesa ferð best burturúr. Men róðrarárið sum heild royndist ikki so væl hjá nýggja Klaksvíkinginum, sum teir í virkna róðrarfelagnum í Klaksvík høvdu vónað. Klaksvíkingurin hevur framvegis ikki vunnið síðani í 1970!

Vestmenningurin helt alla tíðina tørn um oddasessin. Hálvi skuturin gjørdist til ein heilan skut, og framvið Molanum var Vestmenningurin eina hálva bátslongd frammanfyri kappingarneytarnar. Teir báðir næstu royndu á síðstu meiri enn eitt hundrað metrunum at hótta oddafiskin. Munurin minkaði, men tað eydnaðist ikki at taka Vestmenningin, sum enn eina ferð var hinum ov boysin í ólavsøkuróðrinum, sum vestmenningar so ofta hava vunnið.

Havnarbáturin og Eysturoyingurin kappaðust um meistaraskapin. Tann av teimum báðum, sum kom fyrstur á mál, vann meistaraskapin. Eysturoyingurin vann ta kappingina. Harvið stóðu teir seg betri, enn teir fyrr í summar hava gjørt, tá tað hevur verið kappast á stuttu teinunum.

Men tað var so sera javnt. Havnarbáturin var nummar tvey og harvið á veg ímóti FM heitinum, tá tað restaðu eitt hundrað metrar. Men teir umborð á Eysturoyinginum áttu flestu kreftirnar og mestu orkuna í endaspurtinum. Skuturin, sum Havnarbáturin var frammanfyri, tódnaði og tódnaði, í nøkrtum tøkum í endaspurtinum lógu bátarnar stavn um stavn, men á málinum var Eysturoyingurin næstfremstur og FM vinnari.

Havnarbáturin var stóri taparin. Eitt er, at tað ikki eydnaðist teimum at vinna FM heitið í heimasjógvi og harvið at gera Sílinum við dreingjum og gentum kunstin eftir – altso bæði at vinna ólavsøkuróðurin og FM heitið. Tað verra fyri Havnarbátin var, at triðja plássið í ólavsøkuróðrinum bar við sær, at Havnarbáturin í FM kappingini frá at hava verið roknaður sum favorittur at vinna FM heitið datt heilt niður á triðja plássið. Tað var eitt stórt vónbrot.

Sigurin hjá Vestmenninginum bar sjey stig við sær í FM kappingini. Tað var ikki nóg mikið at vinna FM heitið. Kiksarin vesturi í Miðvági, tá fleiri av vestmenningum vóru illa fyri orsaka av sjúku, kostaði tey stigini, sum á ólavsøku restaðu í fyri at vinna FM heitið. Men ólavsøkusigurin mundi kennast søtur. Umframt at vera góður endi á róðrarárinum bar hann við sær, at vestmenningar í FM kappingini endaðu frammanfyri havnarmenn. Tað hevði sjálvandi verið allar best hjá vestmenningum, um teir høvdu vunnið FM. Men tá tað ikki bar til, kundi tað neyvan kennast søtari hjá teimum úr Vestmanna, enn at teir fingu sjey stig, vunnu silvurmerkini í FM kappingini og harvið trýstu Havnarbátin niður á triðja plássið.

Drúgvu manningini umborð á Eysturoyinginum verður ynskt hjartaliga tillukku við FM heitinum. Síðani FM kappingarnar í 1973 vórðu skipaðar soleiðis, sum tær hava verið síðani tá, hevur Eysturoyingurin vunnið FM heitið tríggjar ferðir – í 1998, í 1999 og aftur í ár.

Hetta er fyrsta árið, at henda manningin vinnur FM heitið, og tað man neyvan vera nakar ivi um, at teir flestu av ungu monnunum verða at síggja aftur, tá Eysturoyingur og vónandi fleiri 10–mannafør, enn tað hava verið við í kappingini í ár, á norðoyastevnu komandi ár aftur fara at leggja til brots í mest spennandi hásummarkappingini á Føroya landi.



*Vestmenningar snýttu FM-kandidatarnar og struku av stað við ólavsøku-róðrinum. Her heilsa teir uppá Eysturoyingin, sum vann FM-kappingina*

Mynd:Álvur Haraldsen